gult cyan magenta svart

Ungu menninir aftur í eldin

U-16 landsli›i› skal í heyst royna seg móti Sveis og Wales, me›an U-18 li›i› skal spæla móti Slovenia, Grikkalandi og Skotlandi

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Hetta var› úrsliti›, tá UEFA í november mána›i kasta›i lut um, hvussu ungdómslandsli›ini skuldu dystast í komandi EM-undankapping.

Jógvan Martin Olsen er venjari hjá føroyska U-18 landsli›num, og hevur harumframt ábyrgd av landsli›sarbei›inum hjá FSF, tá talan er um yngri landsli›ini.

Sterk mótstø›a

Hóast talan at síggja til ikki er um heilt so sterk li›, sum U-18 li› okkara hev›i í ár, har Italia og Ongland taldust millum mótstø›uli›ini, so heldur Jógvan Martin ikki, at uppgávan nú ver›ur munandi lættari.

– Ta› er greitt, at talan ver›ur neyvan um sterkari mótstø›u, men ta› ver›ur ein stórur biti kortini, heldur hann.

Um dystirnar hjá U-18 li›num, sigur hann, at talan her um javnt sterk li›. Serliga rokni eg vi›, at grikska li›i› er sterkt, og Slovenia hevur vanliga gó› ungdómsli› heldur hann. Skotlandi hevur føroyska li›i› roynt seg ímóti, tá talan var um U-16 landsli›i›, og tá vístu teir seg í øllum førum at vera sterkir, sigur venjarin.

– Ta› er sum so líka miki›, hvørji li› vit hitta, tí vanliga eru flestu tjó›irnar javnt sterkar. Ta› eru kanska Frakland og Portugal, sum skilja seg serliga út, men annars vil talan altí› vera um sterk mótstø›uli› fyri okkara vi›komandi, heldur hann.

Hinvegin dylir hann heldur ikki fyri, at júst U-18 árgangurin er ein hin sterkasti, sum vit eiga.

Hann vísir á, at leikararnir nú eru um at hava hampuliga nógvar altjó›a dystir á baki, og at hesar royndir eru vi›virkandi til, at li›i› roynist alsamt betri á vøllinum.

Naka› anna› er eisini tann sannroynd, at fleiri av leikarunum longu nú hava royndir frá bestu heimligu deildini. Hann vísir her á leikarar so sum Jón Róa Jacobsen, Jann Inga Petersen, Kristian á Lakjuni (fyribils givin), Hjalgrím Elttør og Símun Joensen. Alt anna› líka heldur hann, at hetta átti at veri› til at ment leikararnar enn meira.

N‡tt li›

Um vánirnar fyri dystirnar hjá U-16 li›num, sigur Jógvan Martin, at eisini hjá teimum ver›ur trupult.

Hetta er fyrsta veruliga stigi› í landsli›sfótbólti, og tí skal venjarin at kalla seta eitt n‡tt li› saman út frá teimum leikarum, sum framvegis eru eftir frá li›num í ár, sigur Jógvan Martin. Føroyingar hava eisini U-14 landsli›, men hetta hevur ikki roynt seg í veruligari altjó›a kapping, tó at hetta eisini er vi› til at geva leikarunum royndir.

Uttan at kenna stórvegis til mótstø›uli›ini, sum her eru Sveis og Wales, so roknar venjarin eisini her vi›, at talan ver›ur um truplar uppgávur.

Jógvan Martin Olsen roknar vi›, at føroysk ungdómslandsli› fyrr ella seinni fara at skapa eina sensatión

Gongur framá

Um føroyska ungdómsfótbóltin sum heild, er Jógvan Martin Olsen annars av teirri fatan, at ta› gongur stø›ugt fram á hjá føroysku li›unum.

– Serliga ta› ta› leikararnir tora at spæla, sum er stóri munurin nú í mun til stø›uni fyri fáum árum sí›ani.

Spurdur um ta› bert er ein spurningur um tí›, á›renn føroyingar skapa eina sensatión vi› yngru li›unum, sigur hann, at ta› er hann vísur í.

– Í nógvum førum hava vit havt sera gott tak á hinum londunum, men so hava persónlig mistøk vi›ført at li›i› ver›ur revsa›. Vit eiga tó altí› at seta okkum sum mál at skapa okkurt óvænta› úrslit, og eg ivist ikki i, at hetta fer at koma, sigur Jógvan Martin Olsen at enda.

Bidnir aftur

Tríggir ungir føroyskir fótbóltsleikarar vóru fyri stuttum í Ongalndi á venjingarfer›, og felags fyri allar er, at teimum stendur í bo›i at koma aftur

FÓTBÓLTUR

Jákup Mørk

Talan er um teir tríggjar, Jann Inga Jacobsen úr B68, Jón Róa Jacobsen úr HB og Inga Højsted úr B36. Teir bá›ir fyrst nevndu hava veri› í Derby, me›an Ingi hevur veri› hjá stórfelagnum, Arsenal.

Ikki kann sigast anna›, enn at væl hevur gingist hjá teimum trimum, og hóast teir vegna vánaligt ve›ur ikki kundu royna seg í røttum dysti, so hava venjararnir í feløgunum í øllum bo›i› teimum at koma aftur til venjingar.

Jákup í Stórustovu, leikaraumbo›sma›ur, sigur vi› Sosialin, at orsøkin til hetta sjálvsagt fyrst og fremst er hon, at onglendingarnir hava veri› væl nøgdir vi› ta›, sum teir higartil hava sæ›.

Spurdur um talan nú ver›ur um rættiliga royndarvenjing hjá teimum trimum unglingunum, svarar Jákup í Stórustovu, at ta› er kanska at siga dekan ov nógv.

– Sum sagt, so hava onglendingarnir veri› nøgdir vi› ta›, sum teir hava sæ› higartil, og tí vilja teir fegnir síggja leikararnar eina fer› enn.

Allar helst ver›ur hetta tí›liga í komandi ári, og fyri at leikararnir skulu vera so væl fyri, sum til ber, venja teir tí vi› fyrsta li›shópunum hjá feløgum sínum í vetur. Hetta hava Jón Rói og Jann Ingi longu gjørt í alt ár, me›an talan er um eina n‡ggja stø›u fyri 15 ára gamla Inga Høgsted.

Jákup leggur í hesum sambandi afturat, at ta› ikki bert eru hesi feløg og hesir leikarar, sum tykjast áhugaverd í so máta í løtuni. Eitt nú vísir hann á, at Jann Ingi og Ingi longu hava fingi› eina innbjó›ing frá PSV Eindhoven, har teir á›ur hava veri›, og uttan at seta nøvn á sigur hann eisini, at í løtuni ver›ur arbeitt vi› fyrispurningunum upp á a›rar ungar føroyskar leikarar.

N‡ggj verkætlan

Hetta var annars seinasti partur av eini verkætlan, sum Jákup fór undir fyri gó›um ári sí›ani.

Tá vór›u fleiri ungir føroyskir leikarar valdir út, og sí›ani hava hesir veri› runt í ymsum europeiskum feløgum og vant. Stu›lar fyri verkætlanini hava veri› Føroy Shell, Føroya Sparikassi, Tryggingarfelagi› Føroyar og Atlantic Airways.

Hóast henda verkætlan nú er li›ug, so merkir ta› ikki, at arbei›i› hesum vi›víkjandi er steg›a.

Jákup í Stórustovu arbei›ir í løtuni vi› a›rari ætlan, har ein hópur, manna›ur vi› ungum føroyskum leikarum, skal til Onglands at dystast móti ymsum li›um.

Jákup sigur, at áhugin fyri hesum tykist stórur í Bretlandi, og tí væntar hann ikki, at nakrir trupulleikar ver›a vi› at finna hóskandi mótstø›u.

Hvussu og nær hetta ver›ur fyriskipa›, ver›ur helst meira at frætta um í næstum.

Tjaldur-Kyndil 21-28 (10-16)

Endiliga ein sigur

Kyndil fekk uttan stórvegis trupulleikar vænta›a sigurin á Tjaldri

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Kyndil fór úr aftur Runavíkini vi› tveimum stigum, eftir at tær uttan stórvegis hóvasták høvdu bast kvinnunum hjá Tjaldri í seinasta dystinum undan jólaste›ginum.

Onganti› í vanda

Hóast talan ikki var um tann øgiliga munin í málum, so kom sigurin hjá kyndilskvinnunum onganti› í vanda.

Fyrsta korteri› leika›i annars hampuliga javnt á, men so gjørdu gestirnir eitt rættiligt hál undan ste›ginum, og so var at kalla leyst og li›ugt.

Um sigurin sum so mundi hava nakran serligan t‡dning fyri kyndilskvinnurnar, er ilt at siga, men undir øllum umstø›um man ta› kennast fløvandi hjá teimum, nú tær aftur sluppu at vinna ein dyst.

Hjá Tjaldri mugu tey bert ásanna›, at heldur ikki í hesum førinum fingust stig burtur strí›num móti einum av ovaru støddu li›unum.

Hinvegin var ta› helst heldur ikki móti Kyndli, at tær rokna›u vi› at fáa nøkur stig. Skal tilveran í bestu deildini bjargast, er ta› fyrst og fremst móti Sóljuni, at roknast skal vi› stigum, og hetta munnu tær hjá Tjaldri eisini vera fullgrei›ar um.

Dysturin í tølum

Málskjúttar:
Tjaldur: Beinta Joensen 8(2), Mwlitza Ergic 4, Mona Langgaard 3, Turid Lamhauge 3(1), Kristina Ellingsgaard 1, Oddvá Fossdalsá 1, Ann Mari Østerø 1
Kyndil: Jórun Ludvig 6(3), Signhild Petersen 5, Brynhild Klein 5(1), Lotte Sørensen 5(1), Anita Kjærbo 4, Jensia Petersen 2, Ann Hansen 1

Anand og Shirov í finaluna

Fríggjadagin bleiv greitt hvørjir vunnu sær sæti› í Fide-HM finaluni. Viswanathan Anand vann rættiliga trygt á Michael Adams, me›an stjørnuskoti› Alexander Grischuk gav Alexei Shirov har›a mótstø›u, men mátti at enda lúta. Finalan ver›ur í døgunum 20-27. desember í Teheran, Iran.

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Hægsrata›i Anand og fjór›hægstrata›i Shrirov høvdu bá›ir sera sterka mótstø›u á veg til finaluna. Anand mátti til dømis út í langan umdyst vi› Alexander Khalifman, so langt at dysturin bleiv avgjørdur vi› snartalvi, sum Anand sjálvsagt vann. Shirov var í hvørjum dysti undan hálvfinaluni í umdysti, og ta› tekur kreftir frá einum, men hann vísti hvørja fer› sína styrki og vann umdystirnir.

Anand sum enn onganti› hevur havt tittulin sum heimsmeistari, undantiki› juniorheimsmeistari, hevur fingi› sera gó›an stu›ul úr heimlandinum India ígjøgnum kappingina. Telva› hevur nevnliga veri› í India, og har er hann nærum ein gudur. Samstundis sum Anand fekk hollan stu›ul, so var› eisini eitt øgiligt tr‡st lagt á hann. Allir indar vænta›u Anand at koma ví›ari til finaluna, og hetta megna›i hann eisini. Eitt tekin at Anand klárar torførar uppgávur undir sera stórum tr‡sti. Í 1995 hev›i Anand møguleikan tá hann leikti HM dyst ímóti Kasparov, men í hesum dysti var› eingin kjansur hjá honum.

Ímóti Shirov er hann lítil favorittur, og Anand sum hevur ligi› í topp 5 seinastu nógvu árini, hevur nógvar royndir og júst hetta kemur væntandi hansara til gó›ar siga talvserfrø›ingar.

Enn ein finala hjá Shirov

Tilflutti spaniólin Shirov hevur á›ur leikt seg til eina HM finalu. Ta› var í 1998 tá hann vann hálvfinaluna ímóti V. Kramnik og sostatt átti at møta Kasparov í finaluni í talvsamgonguni sum Kasparov tá stó› á odda fyri. Ta› kom klutur í samrá›ingar um t. d finaluvir›islønina, og hesin dystur bleiv aldrin veruleiki. Synd fyri Shirov sum nú tvey ár seinni sá Kramnik - sum hann hev›i vunni› á - vinna ein privatan HM dyst ímóti Kasparov.

1. hálvfinala

Bretin Michael Adams sum eisini er millum superstórmeistarnir, fann ongan veg ígjøgnum múr Anands. Fyrsta talvi› bleiv ein skjótur javnleikur, og einasta avgerandi talv í hesari hálvfinalu var anna› talvi. Anand hev›i hvítt og fekk fyrimun eftir at Adams hev›i lukka› seg sjálvan fastan, og vann trygt. Stór frøi á indarum kring landi›, og nú var lei›in sett.

Tri›ja- og fjór›a talvi› enda›i vi› javnleiki, og Anand sostatt ví›ari vi› úrslitinum 2,5-1,5. Adams fekk í hesum talvum onganti› veruliga hótt Anand, og kanst tú ikki ta›, er eingin gjøgnumvegur. Adams hev›i eina gó›a kapping, men enn vísir Anand at vera ein ov stórur biti hjá fremsta bretska telvaranum.

2. hálvfinala

Var› Anand-Adams dysturin líti› spennandi, kann avgjørt ikki sigast ta› sama um Shirov-Grischuk hálvfinaluna. Bá›ir hesir telva vilt, og ofra gjarna materiali fyri gott spæl.

Undan dystinum var mett at at 17 ára gamli Grischuk ongan livandi kjans hev›i ímóti tí ellivu ára eldri Shirov, men eftir tveimum talvum teirra millum stó› á jøvnum 1-1. Nú var púra opi›, men enn var› mett at Shirov fór at hála sigurin heim. Ta› fyrra talvi› hev›i Shirov nærum útspælt Grischuk sum royndi seg vi› n‡ggjari byrjan, men ta› næsta talvi› tr‡sti Grischuk Shirov somiki› at hesin gjørdi ein øgiligt mistak har hann misti rók.

Tri›ja- og fjór›a talvi› blivu tvey ótrúlig talv. Í tí tri›ja ofra›i fyrst Shirov mann fyri tvær finnur, og fekk heilt gó›a stø›u. Sí›ani fann Grischuk eina ney›plan har hann mótofra›i bisp fyri at finna javnleikin, og hendan plan hjá Grischuk var› somiki› væl gjøgnumførd at sjálvur Kasparov hámetti henni. Men tíverri fyri Grischuk flutti hann skeiva leik í kritisku stø›uni og Shirov var skjótur og vann. Grischuk hev›i javnleikin í a›rari hondini, men mátti nú vinna fjór›a og seinasta talvi› fyri at útjavna. Shirov sum hev›i svarta fólki›, var› tr‡stur í hesum talvi, men fann somulei›is eina ótrúliga bjargingarætlan, sum gav honum ney›uga javnleikin. Men hev›i Grischuk ikki folli› í ætlan Shirovs, ja so hev›i hann havt kjansir at vunni› talvi›.

Kvinnu HM finaluna vann kinesarin Xie Jun á Qin Kanying. Xie Jun sum hevur eitt ratingtal á 2550, endurvann sostatt tittulin.

Kasparov hámetur Grischuk

Kasparov hámetur spælistílin hjá bæ›i Shirov og Grischuk, og sigur somulei›is at Grischuk heilt skjótt ver›ur at finna ímillum teir heilt stóru, og tá meinar hann heimselituna.

Ótrúligt hál hjá Grischuk sí›ani oktober mána›a, tá hann fyrst vann 3rd Tórshavn International, og sí›ani var vi› vinnandi russiska OL li›num, har hann fekk 7,5/10 á fjór›a bor›i. Nú var› hann millum f‡ra teir fremstu í Fide HM.

Finalan í Iran

Shirov kann hann nú saman vi› Anand fara til Teheran, har finalan ver›ur leikt í døgunum 20-26. desember. Seks talv skulu leikast, og ver›ur javnt so ver›ur telva› kviktalvsumdystur tann 27. desember.

Anand fær tískil ikki heimafyrimun, men hinvegin er tr‡sti› á honum minka. Anand hevur betri innah‡sis úrslit, men shirov hevur yvirliva nógvir torførar umdystir í hesum Fide HM, og samstundis sum Anand hevur ta› fyri at kiksa í avgerandi talvum, eitt nú í Fide HM 1997, tá hann heilt óvænta› tapti ímóti Anatoly Karpov, og tískil er torført at meta um úrsliti›.

Fylgjast kann vi› á http://wcc2000.fide.com.

Talvi› hesa vikuna

Hvussu Shirov bjarga›i sær frá tapi í avgerandi fjór›a talvinum.

Grischuk,A (2606) - Shirov,A (2746)
2000 World Chess Champion New Delhi, Tehr. 15.12.2000

1.e4 e5 2.Nf3 Nf6 3.Nxe5 d6 4.Nf3 Nxe4 5.d4 d5 6.Bd3 Bd6 7.0-0 0-0 8.c4 c6 9.cxd5 cxd5 10.Nc3 Nxc3 11.bxc3 Bg4 12.Rb1 Nd7 13.h3 Bh5 14.Rb5 Nb6 15.c4 Bxf3 16.Qxf3 dxc4 17.Bc2 Qd7 18.a4 g6 19.Be3 Rac8 20.Rfb1 c3 21.a5 Nc4 22.Rxb7 Qe6 23.Bb3 Qf5 24.Qxf5 gxf5 25.Ra1 f4 26.Bc1 Rfe8 27.f3 c2 28.Kf2 a6 29.Ra4 Nb2!! Bjargingarroyndin, sum eydna›ist. 30.Bxf7+? Bxb2 gevur Grischuk møguleika at halda fram vi› gó›um kjansum 30...Kf8 31.Bxb2 c1Q 32.Bxc1 Rc2+! 33.Kf1 Rxc1+ 34.Kf2 Rc2+ 35.Kf1 Rc1+ _-_

Tak skal á Tórsvøll

Nevndin í grunninum fyri Tórsvøll hevur samtykt, at arbei›ast skal vi› at gera tak yvir ásko›araplássini, men enn er einki ítøkjuligt hesum vi›víkjandi

TÓRSVØLLUR
Jákup Mørk

Menn eru í løtuni í fer› vi› at gera bygningin vi› Tórsvøll kláran, og tá hetta er fingi› frá hondini, ver›ur næsta stig at fáa tak oman yvir ásko›araplássini vi› vøllin.

Poul Michelsen, forma›ur í Grunninum fyri Tórsvøll, sigur vi› Sosialin, at ta› sjálvsagt er eitt mál í sjálvum sær at fáa tak yvir ásko›ararnar.

– Nevndin hevur samtykt, at arbei›ast skal vi› at fáa fíggin til hetta, men akkurát nær og hvussu fái eg als ikki sagt, sum er, sigur Poul Michelsen.

Einki áramál

Spurdur um, hvussu ítøkjuligar ætlaninar hesum vi›víkjandi eru, svarar forma›urin, at í løtuni er einki fastlagt, anna› enn ta› at arbeitt ver›ur vi› málinum.

– Nú eru vit so í fer› vi› at gera húsini klár, og ætlandi skulu vátrúminini ver›a klár til komandi ár.

– Vi›víkjandi takinum, so hava vit enn ikki avgjørt, hvussu ein slík konstruktión skal ver›a, og tí fái eg heldur ikki sagt naka› sum helst um kostna›in av hesum, men ta› er greitt, at vit tosa um fleiri milliónir.

Hóast ta› sostatt ikki ver›ur í bræ›i, at taki› kemur, so heldur Poul Michelsen ikki, at taki› yvir vøllin liggur so ø›iliga langt frammi í tí›ini.

– Eg kann ikki seta naka› áramál á, men eg síggi hetta í øllum førum sum naka›, i› kann røkkast innan eina yvirsko›iliga framtí›, sigur Poul Michelsen at enda.

Komandi ár eru vátrúmini í bygninginum vi› Tórsvøll li›ug, og eftir ætlan skal tak oman yvir ásko›araplássini ver›a næsta byggistig